UTTAN ÚR HEIMI

## Høgravongurin ávarar Bush

Tey konservativu í republikanska flokkinum í USA eru fegin um, at Harriet Miers gjørdi av at taka seg aftur sum dómaraevni til amerikanska hægstarætt. Fyri George W. Bush, forseta var avgerðin ein smeitur, og tey konservativu ávara nú forsetan ímóti at gera eitt tílíkt mistak afturat.

– Vit hava ikki álit á Bush, tí hann er ikki ein rættur konservativur politikari. Hann hevur ávísar konservativar tankar, men hann tekur ikki undir við einari rættari konservativari hugsjón, og alt ov ofta tekur hann ov frælslyntar avgerðir, sigur Melanie Morgan, sum er formaður í tí erkakonservativa felagsskapinum Move America Forward.

Tað var hesin felagsskapurin, sum gekk á odda í stríðnum ímóti Harriet Miers sum hægstarættardómara, og Melanie Morgan ávarar Bush ímóti at gera eitt tílíkt mistak afturat.

– Ger hann tað, missa teir konservativu amerikanararnir alt álit á honum, sigur hon við tíðindastovuna AP.

## Aftur ruðuleiki

Politiskur ruðuleiki valdar aftur í afrikanska landinum Fílabeinsstrondini. Sunnudagin var seinasta skeiðið hjá Laurent Gbagbo, forseta úti, men tað hevur ikki borið til at fáa semju um, hvør skal taka við.

Afrikanski Eindarfelagsskapurin og ST hava skotið upp, at forsetin verður sitandi í eitt ár afturat, men at hann og forsætisráðharrin skulu býta valdið sínamillum, til nýggjur forseti kann veljast. Men tað vil andstøðan ikki hoyra talan um. Ein uppreistrarfelagsskapur, sum hevur valdið har norðuri í landinum, vil heldur ikki góðtaka, at forsetin verður sitandi. Í gjár gingu fleiri túsund fólk mótmælisgongu ímóti at leingja skeiðið hjá forsetanum, men løgreglan legði uppí við táragassi og spjaddi mótmælisgonguna.

Eygleiðarar stúra fyri, hvat kann henda. Í fjør skipaðu hermenn, sum styðja forsetan, fyri umfatandi ófriði í stórbýnum Abidjan, og sambært útlendskum keldum royna teir nú at øsa fólk har vesturi í landinum. Tað kann enda við blóðugum samanbrestum, siga eygleiðararnir.

## Prestur fekk stoyt

Ein prestur í einari baptistasamkomu í amerikanska statinum Texas doyði um vikuskiftið av elektriskum stoyti.

Tann 32 ára gamli presturin stóð í einum baðikari, tí hann skuldi doypa eina kvinnu. Men tá hann tók mikrofonia og skuldi siga navnið á kvinnuni, fekk hann elektriskan stoyt og small. Nakrir læknar vóru ímillum tey 800, sum vóru í samkomuhøllini, og sjálvt um teir bóru skjótt at, eydnaðist tað teimum ikki at bjarga prestinum. Hann doyði á veg á sjúkrahúsið.

Kvinnan, sum stóð undir liðini á presti, tá hann fekk stoytin, varð eisini flutt á sjúkrahúsið, har hon bleiv viðgjørd fyri skelk, skrivar AP úr Waco.

## Bikini-forboð í Brasil

Býráðið í brasilska býnum Rio de Janeiro hevur samtykt, at í framtíðini skulu bikiniklæddar kvinnur ikki brúkast í reklamum hjá ferðavinnuni.

Vanliga verður sagt, at afturparturin á einari bikiniklæddari brasilskari kvinnu er ein partur av landsins mentan, men býráðið í Rio de Janeiro hevur nú valt at broyta ta uppfatanina. Meirilutin í býráðnum sigur, at Brasil hevur so nógv annað áhugavert at vísa teimum útlendsku ferðafólkunum, og at myndirnar av teimum hálvnaknu kvinnunum eru við til at draga sokallaðar sexferðamenn til landið, tí í teirra eygum hevur afturparturin á brasilskum kvinnum einki við landsins mentan at gera.

Guvernørurin í Rio de Janeiro hevur nú fingið samtyktina hjá býráðnum til støðutakan. Tað er hann, sum hevur tað seinasta orðið at siga í slíkum málum.

# Mong fara at doyggja afturat í Pakistan

**Tað fer ikki at eydnast at útvega teimum heimleysu í Pakistan tak yvir høvdið, áðrenn veturin kemur**

NEYÐHJÁLP
*Árni Joensen:*
*fartekst@mail.dk*



*Hesir tríggir smádreingirnir í Kashmir hava sæð pápanar sita oig biðja. Nú gera teir tað sama*
Mynd: Reuters

– Eg noyðist tíverri at ásanna, at vit eru ov sein á sjóvarfallinum. Um einar fjúrtan dagar kemur veturin, og vit hava ongan møguleika at útvega teimum nógvu heimleysu tak yvir høvdið til ta tíð.

Tað sigur aðalskrivarin í Reyða Krossi í Danmark, Jørgen Poulsen. Hann hevur júst verið í jarðskjálvtaøkinum í Pakistan saman við danska menningarmálaráðharranum, Ullu Tørnæs. Jørgen Poulsen sigur, at tann stóri trupulleikin er at fáa hjálpina fram til tey neyðstøddu, tí alt samferðslukervið at farið.

Orsakað av støðuni hava hjálparfelagsskapirnir gjørt av at leggja serligan dent á at útvega fólki tjøld, teppi og ymisk amboð. Men tey noyðast sjálvi at fáa sum frægast burtur úr húsatoftunum, so tey kanska kunnu útvega sær skjól til veturin.

Ulla Tørnæs heldur ikki, at danska stjórnin skal økja hjálpina til tey neyðstøddu. Hon vísir á, at nógv lond hava als ikki latið tað, sum tey hava lovað, og at tann hjálpin má koma fyrst.

Annars heldur danski ráðharrin, at heimssamfelagið er alt ov illa fyrireikað til slíkar vanlukkur. Tí fer hon at skjóta upp, at heimssamfelagið stovnar ein serligan hjálpargrunn, sum skal hava tann neyðuga peningin tøkan, tá so stórar vanlukkur henda. Tað hevði gjørt, at ongum nýttist at bíða eftir pengum frá teimum ymsu londunum, sigur Ulla Tørnæs.

# Tey lærdu rýma úr Irak

**Tann áhaldandi ófriðurin og tey ótryggu viðurskiftini í Irak gera, at lærd fólk í stórum tali rýma av landinum**

IRAK
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Hvønn einasta dag rýma lærdir irakar av landinum. Hildið verður, at einir 800.000 irakar eru rýmdir til Jordan, og at nógvir túsund eru farnir til Sýrialands, Sameindu arabisku emiratini og onnur arabisk lond. Tey, sum hava nóg mikið av pengum, rýma til Bretlands ella til USA.

Tað sigur fyrrverandi ráðharrin Pascalo Warda. Hon greiðir frá, at undir Saddam-stýrinum vóru tað bara limir í stjórnarflokkinum Baath, sum sluppu at fáa sær akademiska útbúgving, og tað ger, at nógv vísindafólk eru illa lýdd í dag, tí tey vóru limir í flokkinum hjá Saddam Hussein. Tí velja tey at rýma av landinum.

– Handilsmaðurin Riyadh Tamimi sigur við AP, at tað er næstan einki útbúgvið fólk eftir í Basra har suðuri í landinum, og sjálvur hevur hann gjørt av at fara av landinum. Hann var limur í Baath-flokkinum, og hann og húsyki hansara hava fleiri ferðir verið fyri ágangi, síðani stýrið hjá Saddam Hussein fall.

– Allir teir góðu verkfrøðingarnir, læknarnir og teir dugnaligu handilsmenninir eru farnir av landinum, sigur Tamimi. Starvsbróður hansara, Ahmed Hammoudi, er longu farin til Sýrialands.

– Stjórnin í Bagdad er ov veik, so vit fáa einki gjørt. Hvussu skal eg arbeiða har, tá eingin er at verja meg, spyr Hammoudi, sum ikki dylur fyri, at hann vildi heldur verið í Irak enn í Sýrialandi. Men tað ber ikki til, sigur hann.